

Statoil. Mynd: Harald Pettersen/Statoil

# Statoil umhugsar at keypa felag fyri 400 milliardir

**Jógvan Hugo Gardar**

17.03.2015 - 13:50

Oljan.fo

Sambært Houston Business Journals er Statoil í samráðingum við EOG Resources um at leggja saman, ella at keypa, hetta felagið, sum framleiðir skifergass, skrivar offshore.no.

Eitt keyp kemur helst at liggja upp móti 400 milliardum krónum.

Sambært Houston Business Journals er tað vælhugsandi at Statoil ynskir at keypa hetta felagið, fyri at tryggja sína hjáveru í Houston og innan skifergass.

Hvørki EOG Resources ella Statoil ynskja at gera viðmerkingar til málið.